# æsarnar millum stóru tangarnar

vildu, høvi at smakka ymisku brennivínssløgini, og høvið var eisini at vitja lítlu sølubúðina, sum er á verksmiðjuni.

## V&S Group

Í 1999 varð felagið, sum gongur undir navninum, "De Danske Spritfabrikker", keypt av svensku vín- og rúsdrekkaketuni, V&S Group, sum eigur dóttirfelagið, V&S Danmark A/S.

V&S Group er ein leiðandi framleiðari og útbjóðari av víni og rúsdrekka í Norðurevropu og telist millum tíggju tær størstu rúsdrekkafyritøkurnar í heiminum.

Kendasta vørumerkið hjá V&S Group er Absolut-Vodka, sum samstundis telist millum trý av heimsins kendastu brennivínssløgum.




*- Hesin hevði ikki riggað so væl at farið á morgunmøti við, helt Olivur Joensen á Norðlýsinum fyri*
Mynd: Vilmund Jacobsen




*Á hesum mátara, har øll framleiðslan fór ígjøgnum fram til einaferð í sjeytiárunum, er teljari sum sigur, hvussu stór framleiðslan er – og hareftir vórðu avgjøldini roknað*
Mynd: Vilmund Jacobsen

De Danske Spritfabrikker, sum eisini er veitari til danska kongshúsið, telist í dag millum størstu framleiðarar av brennivíni í Norðurlondum.

Fundamentið varð lagt við akvavittini, men í dag fevna vørusløgini um mong onnur brennivínssløg, eitt nú vodka, rom, ginn, whisky, cognac, gammel dansk, bitter dram og likør.

## Mannavirðing

Í faldara, sum Aalborg Akvavit hevur, verður víst á, at njótanin av rúsdrekka er ein partur av mentanini í okkara parti av heiminum. Víst verður eisini á, at drykkjuskapur, sum ikki fer fram við máta, kann føra til misnýtslu.

- De Danske Spritfabrikker eru sannførd um sína ábyrgd og kenna eina moralska skyldu at kunna um "góða drykkjumentan", sum tey rópa tað. Tí leggja vit dent á eina ábyrgdarfulla marknaðarføring, samstundis sum vit eisini menna vørur, ið eiga eitt náttúrligt pláss í samveruni millum vaksin fólk, eitt nú vørur sum "ingrediens" til góðar máltíðir.

Lagt verður aftrat, at fyritøkan hevur virðing fyri menniskjanum og umhvørvinum, soleiðis at allar galdandi reglur á økinum verða fylgdar.

- Vit vilja vera eitt gott fyridømi, sum ein ábyrgdarfull fyritøka, siga tey.

## Áhugaverd søga

Danir halda, at søgan um "snapsin" og De Danske Spritfabrikker er so áhugaverd, at teir fegnir vilja lýsa hesa søgu fyri fólki, sum ferðast á Ålborg-leiðini. Tí kunnu fólk – einstaklingar ella bólkar - vitja verksmiðjuna og fáa eina kunning, samstundis sum tey sleppa at síggja bæði gamalt og nýtt á vitjanini – og er talan um serliga vitjan, sleppa tey eisini at velja sær ein lítlan snaps í stóra úrvalinum av fløskum, sum hanga á vegginum í "barrini".

Aalborg Taffel Akvavit, sum telist millum kendastu merkini – og eisini er kent undir navninum, Rød Aalborg, er tó eldri enn sjálv stovnanin av De Danske Spritfabrikker. Gjøgnum árini er hetta brennivínsslagið framleitt saman við eplum, hveiti og mais, men í dag verður hesin klári drykkur bert framleiddur við danskari hveiti.

